# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Hatta var óluksáliga hart, men stuttligt*

*Jónleif Sólsker*

Kyndil II-VÍF 41-39 (15-12), (30-30), (34-34)

# Sensatiónin gjørdist veruleiki

**Tveir umdystir skuldu til, áðrenn sensatiónin var veruleiki. Veteranarnar hjá Kyndli vunnu í gjárkvøldið ein sera spennandi dyst móti besta liðnum hjá VÍF, men tað var eftir tvær ferðir fimm minuttir longda leiktíð**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Jónleif Sólsker og Jacob Jónsson eru tveir av veteranunum, sum spæla á aðrudeildarliðnum hjá Kyndli*

Teir grønu vóru helst undirtippaðir í øllum fjórðingsfinalunum, og í seinastu fjórðingsfinaluni skuldu teir helst ikki havt nakran møguleika.

Men Jacob Jónsson, Jónleif Sólsker, Birgir Hansen, Geir Wardum, Hannis Wardum og hinir vildu tað tó øðrvísi.

Kyndil var nevnliga á odda allan dystin. Uttan at seta nakra serliga ferð á, megnaðu teir at fylgja við VÍF, sum tó í evstu løtu fekk javnað.

Í fyrra umdystinum var eisini um reppið, at Kyndil endurtók FM-sigurin á VÍF fyri fýra árum síðani. Jacob Jónsson vann sær brotskast, tá bert fá sekund vóru eftir at spæla. Eins og hann gjørdi tað í 2004 varð Jónleif Sólsker settur at skjóta, men hann misnýtti, og so varð neyðugt við enn einum umdysti.

Og her var Kyndil loksins omaná. Teir megnaðu at halda høvdinum kalt, og við 41-39 vunnu teir sær eina tí størstu føroysku hondbóltssensatiónina í fleiri ár.

### Wardum-arnar

Nevnir man Kyndil, kemst ikki uttanum at nevna navnið Wardum, fyrr ella seinni. Seinastu mongu árini hava hesi verið við til at mynda Kyndil, um tað so er á vøllinum ella við stýrisvøðlin á bonkinum.

Í gjárkvøldið vóru ikki minni enn fýra Wardumarar við á triðbesta Kyndlaliðnum, ið tók móti besta liðnum hjá VÍF, og hesir vístu, at enn eru knotur í gomlum monnum.

### Skerdir vestmenningar

Vestmenningar hava uttan iva hildið tað vera ein avgreiðsluspurning, tá teir í gjárkvøldið skuldu spæla í Havn móti gomlu veteranunum úr Kyndli, men tað skuldi vísa seg at vera alt annað enn tað.

At teir hava undirmett Kyndil, og samstundis vóru skerdir, tí Áki Olsen ikki var við, hevur óivað verið við til at set tein dempara á innsatsin hjá VÍF.

Gamla Kyndlaliðið megnaði allan dystin at halda dystarferðini niðri á einari rímuligari ferð, og hetta, saman við ómetaliga nógvu royndunum hjá teimum grønu, hjálptu teimum til sigurs í einari av teimum heilt stóru sensatiónunum í nýggjari tíð.

## FAKTA

**Dysturin í tølum:**

**Kyndil II-VÍF 41-39 (15-12), (30-30), (34-34)**

**Málskjúttar:**

**Kyndil II:** Jónleif Sólsker 9, Bjarni Wardum 9 (1), Hannis Wardum 8 (1), Jacob Jónsson 7, Uni Wardum 6 (1), Geir Wardum 1, Dia Midjord 1.

**VÍF:** Agnar Joensen 8 (2), Rúni Joensen 8, Bjarti Hansen 8, Daniel Rapa 6, Sjúrður Poulsen 5, Regin Joensen 1, Jákup S. Andreasen 1, Rói Lamhauge 1.

**Brotskøst:** Kyndil II 7, VÍF 3

**Útvísingar:** Kyndil II 2, VÍF 5

**Dómarar:** Kári Nielsen & Janus Sørensen

## EIK høvuðsstuðul hjá GÍ/LÍF

Í dag gjørdist greitt, at EIK verður høvuðsstuðul hjá samanlagda felagnum GÍ/LÍF.

Fýra fegin umboð fyri EIK, GÍ og LÍF uttanfyri deildina í Gøtu.

Á deildini í Gøtu skrivaðu partarnir í morgun undir ein tvey ára sáttmála, ið inniber, at EIK verður høvuðsstuðul hjá bæði vaksnamanna- og ungdómsdeildini.

Í feløgunum fegnast man um, at Ársins virki 2007 og Bank of the year hevur valt at stuðla samanlagda felagnum, sum leggur til brots í øllum deildum komandi kappingarár.

# Andsperran gjørdi um seg

**Gomlu Kyndilsspælararnir fóru gjøgnum 80 minuttir móti ungu vestmenningunum. Og komu loksins av vøllinum sum vinnarar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ikki meira, enn gomlu Kyndils-spælararnir orkaðu at ganga hósmorgunin.

- Hatta var óluksáliga hart, men stuttligt, vóru fyrstu orðini, sum Jónleif Sólsker hevði at siga, tá vit høvdu hann á orði.

Tá tit fóru inn til dystin. Høvdu tit tá nakran tíð trúnna uppá, at tað skuldi bera til at vinna á VÍF?

- Ja, tað haldi eg. Vit vita í øllum førum, hvat vit duga. Samstundis vistu vit eisini, at vestmenningar vóru nakað skerdir. Eitt nú var Áki Olsen ikki við, og tað gjørdi sjálvandi okkara uppgávu nakað lættari. Vit royndu so at spæla dystin í okkara tempo, og sjálvt um tað ikki var serliga høgt, so megnaðu vit alla tíðina at fylgja við.

Og sum dysturin gekk, so gjørdust vestmenningarnir kanska eisini meira frustreraði enn tit?

- Ja, tað haldi eg. Teir høvdu nokk væntað, at hetta var ein avgreiðsluspurningur. Størsti fyrimunurin hjá okkum í so máta var helst, at vit allir hava ríkiligt av royndum. So hóast spenningurin var stórur, so hildu vit alla tíðina høvdið kalt.

Fleiri av spælarunum hjá fremstu Kyndils-liðnum vórðu sitandi í høllini alt kvøldið. Og eftir dystin vóru teir á einum máli um, at teir ikki ynsktu at møta hesum gomlu garpunum í hálvfinaluni. Eitt sjónarmið, sum Jónleif tó als ikki var samdur í.

- Hjá mær er tað týdningarmesta, at Kyndil sleppur í finaluna. Og hittast bæði liðini í hálvfinaluni, so fáa vit heilt víst eitt lið í finaluna. So tað er ein støða, sum eg einki havi ímóti, sigur Jónleif Sólsker.